## Stórur áhugi fyri tjalding

**Selatrað:** Sjóvar kommuna ætlar nú at gera sítt til at útvega fleiri tjaldingarpláss í hesi vøkru bygdini. Samstundis við hetta ætlar kommunan at søkja eftir fólki, ið skal hava umsjón við hesum økinum í summar.

Viðkomandi, ið verður settur í tíðaravmarkaða starvið, kann byrja 1. mai og verður í tí fyribils til 31. oktober í ár. **sb.**



*Náttúran er vøkur á Selatrað. Tað hava tey tjaldhugaðu eisini funnið útav*

## Trø og runnar til fólkið

**Sandur:** Aftur í ár fáa borgararnir á Sandi teir sonevndu plantupakkarnar frá kommununi.

Á fundi herfyri samtykti bygdaráðið at taka við einum tilboði frá Skógrøkt Landsins, sum hesaferð fer at lata 75 pakkar til fólkið í kommununi.

Sum skilst eru tað fleiri og fleiri sum dáma at fríðka rundan um húsini. Hesi fáa nú eitt eyka íkast til hetta frá kommununi. **sb.**

# Bert EITT tips til løgregluna

**Tað hevur ikki gingið serliga væl hjá løgregluni at fáa tips frá vitnum, ið sóu ógvusliga tilburðin sunnumorgunin. - Men fólk eru framvegis vælkomin at ringja til okkara, bæði sum nevnd og sum ónevnd, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini**

RACISTISKUR HARÐSKAPUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** - Vit hava faktiskt bert fingið eitt einstakt tips inn við fleiri upplýsingum, sum vit kunnu arbeiða víðari við, sigur Bergleif við Sosialin.

Eftir ógvusliga tilburðin heitti løgreglan á fólk um at koma við upplýsingum, men enn hevur ikki verið nakar telefonstormur á politistøðini við tipsum.

- Vit rokna heilt víst við, at onkur man hava sæð okkurt ella hevur hoyrt okkurt hesa løtuna, sigur hann.

Allir fjølmiðlarnir hava viðgjørt hetta málið, men kanska skal ein tíð ganga aftrat, áðrenn fleiri vitni fara at gera vart við seg.

Til ber at ringja á politistøðina í Havn og koma við upplýsingum um hetta málið, uttan at neyðugt er at siga hvør ein er.

### Fá fólk

Tað var tíðliga sunnumorgunin at ein 16 ára gamal drongur við øðrvísi húðaliti varð álopin av trimum monnum á alfaravegi við Tinghúsvøllin í Havn.

Ungi maðurin varð háðaður, avhølvaður og haraftrat skammfarin av ringasta slagi, áðrenn teir tríggir menninir, sum vóru fyrst í 20'unum, fóru avstað aftur.

Maðurin var so mikið skelkaður eftir tilburðin, at hann fyrst boðaði løgregluni frá hendingini seinnapart á degi.

Tað er eitt sindur ilt at meta um, júst nær hetta álopið hendi. Mett verður, at tað var millum millum klokkan 4 og 5. Spurningurin er kortini, um her er talan um vetrartíð ella summartíð, tí somu nátt varð klokkan flutt fram.

Um hetta mundið eru vanliga ikki so øgiliga nógv ungfólk í nánd av Klubbagarðinum, tí tey tá fara oman í býin ella niðan í Steinatún.

Hinvegin so ivast løgreglan ikki í, at onkur annar persónur - enn hesin eini sum er komin við upplýsingum - man hava sæð okkurt, sum kann verða løgregluni til hjálpar í kanningararbeiðinum.

# Fyrsta kommunan við sóttreinsaðum vatni

**Gongur so sum Klaksvíkar kommuna ætlar, verður hon fyrsta føroyska kommunan sum veitir øllum borgarunum sóttreinsað vatn**

UMHVØRVI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Hósdagurin í farnu viku - 22. mars - var altjóða vatndagur.

Henda dagin verður kring allan heimin víst á týdningin av at hava ikki bert vatn at drekka, men at talan haraftrat er um reint og gott vatn.

Júst hetta sama hevur Klaksvíkar kommuna arbeitt við tey seinastu árini. Og henda altjóða vatndagin kundi ein í kommununi staðfesta, at langt er ikki á mál í hesum sambandi.

- Seinni í ár fáa borgararnir á Trøllanesi og í Mikladali sóttreinsað vant.

- Og tá hava allir borgararnir í kommununi sóttreinsað vatn, verður sagt úr Klaksvíkar kommunu.

### Framíhjárættur

Í Klaksvíkar kommunu eru í dag vatnverk, sum veita reint vatn til borgararnar í Klaksvík, Ánunum, Norðoyri og í Árnafirði.

- Hetta er ein stórur framíhjárættur hjá okkum, at vit kunnu fáa bæði gott og reint drekkivatn úr kranunum, sigur kommunan.

Til tess at tryggja sær at góðskan av drekkivatninum altíð er í lagi, verða oman fyri 60 vatnroyndir tiknar um árið og síðani kannaðar á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Upplýst verður, at í menningarlondum drekka tey í miðal 10 litrar av vatni um samdøgrið, meðan vit nýta 350 litrar í miðal.

Mett verður haraftrat, at eitt miðalhúsarhald í Føroyum brúkar um 1000 litrar um samdøgrið.

*Klaksvíkingar hava gott og sóttreinsað vatn. Seinni í ár hava øll hini í kommununi sama framíhjárætt*
*Mynd: Snorri Brend*



## Ein vindmylla til bóndan

**Skarvanes:** Tað er neyvan á hvørjum degi, at ein vindmylla verður sett upp í lítlu, fjarskotnu bygdini Skarvanesi. Hetta hendi kortini fyri góðari viku síðani.

Tað er Jákup Martin Debes, bóndi sum hevur bílagt sær hesa mylluna úr Onglandi. Hetta hevur hann gjørt við tí fyri eyga at gerast sjálvforsýnandi við streymi.

Fríðtór Debes, leiðari á Sandoyar Kunningarstovu upplýsir, at vindhjólið hevur ein diametur uppá 1,8 og at myllan er einar seks metrar høg.

Myllan á Skarvanesi klárar at framleiða 750 kw um tíman, sum skuldi verið nóg mikið til eitt húsarhald. Hon er mett at kunna klára eina vindmegi upp til 60 m/sek. **sb.**

## Bygdarfelagið bíðar eftir linjuføringini

**Árnafjørður:** Tað var ein stórur dagur fyri bygdarfólkið í februar mánaði, tá fyrsti spakin varð settur í jørðina fyri tí nýggja bygdarhúsinum.

Tekningarnar til húsið er langt síðani lidnar, og bíðað verður í løtuni eftir at útgrevsturin skal byrja um ikki so langa tíð. Hinvegin, so bíða tey í Árnafirði í roynd og veru eftir at myndugleikarnir skulu taka støðu í einum heilt øðrum máli: Tunnilsætlanini fyri Norðoyggjar.

Tekningarnar av bygdarhúsinum eru nevniliga gjørdar soleiðis, at innkoyringin og forsíðan av húsinum eru eftir núverandi tunnilsvegi.

Men um so verður, at ein nýggjur tunnil verður gjørdur til Árnafjarðar, ber til at snara innkoyringina og forsíðuna til bygdarhúsið við 180 stigum.

- Vit vóna, at ein nýggjur tunnil kenur hendavegin, soleiðis at bygdin kann verða ment nógv meiri, verður sagt úr bygdini, har tey bíða spent eftir útspælinum um tunlarnar. **sb.**